

*Kjartan Sleire og Jan Rúni Poulsen taka sær av løttum eina løtu leygarkvøldið. Teir báðir hava ljósshowið um hendi til øll tey innleiðandi umførini í Prixnum*
Mynd: Jens Kr. Vang

er í Mentanarhúsinum, og tí eru vit eisini tveir um at gera ljós. Vit brúka ta útgerðina, sum hoyrir heima í húsinum, men harafturat verða eisini meira og øðrvísi lampur leigaðar til Prix-tiltøkini, sigur Jan Rúni.

Men tað er eingin trupulleiki hjá tveimum blaðungum fuglfirðingum at halda skil á – tvey ljós høvd skulu nokk klára ljósið.

# Teir ungu stýra showinum

**Ljósmenninir til innleiðandi umførini í Prix Føroyum eru 16 og 17 ára gamlir, men teir stýra showinum við tryggari hond – og nógvum ljósi**

PRIX-LJÓS
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

16 ára gamli Kjartan Sleire og 17 ára gamli Jan Rúni Poulsen standa fyri ljósshowinum til Prix Føroyar kappingina hesaferð. Teir eru báðir fastir ljósmenn í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og teir stýra eisini showinum til tey fýra innleiðandi umførini har.

– Tað er spennandi at gera ljós til Prixið, tað er eitt sindur størri, enn tey vanligu tiltøkini, sum eru her, sigur Jan Rúni Poulsen, sum hevur verið ljósmaður í Mentanarhúsinum síðani hann var 14 ára gamal.

## Ikki øll vita, hvat tey vilja hava

Framførslurnar hjá bólkunum snúgva seg ikki bara um tónar og decibel – tær snúgva seg eisini um stemningar og ljós – og summir bólkar gera nógv burtur úr tí, sum eygað sær, men oyrað ikki hoyrir.

– Summir bólkar vita, hvat teir vilja hava, meðan aðrir ikki hava nakað beinleiðis ynski frammanundan. Tað er kanska eitt sindur lættari at gera ljós hjá bólkunum, sum hava eina meining um, hvussu tað skal vera, men vit royna at finna út av tí saman við bólkunum, sum ikki eru so avgjørdir frammanundan, sigur Jan Rúni Poulsen.

## Royna við ljóðroynd

Tað eru nógvir bólkar til eitt Prix, og ljósmenninir hava ongan livandi kjans at kenna allar bólkarnar og teirra tónleik. Tí er tíðin eisini avmarkað til at leggja eitt ljósshow til rættis.

– Vit plaga at royna okkum fram undir ljóðroyndini, um bólkarnir ikki hava nakra greiða ætlan, og so er møguleikin hjá bólkunum at siga sína hugsan um ljósið, og um teir vilja hava okkurt øðrvísi. Vit plaga so at skriva okkum alt hetta niður og royna at fylgja tí til sjálva framførsluna, sigur Jan Rúni Poulsen.

Hann heldur, at tað er eitt sindur lættari at gera ljós hjá einum bólki, sum hevur sína hugsan um, hvussu ljósið skal vera.

## Meira útgerð enn vanligt

Jan Rúni Poulsen og Kjartan Sleire plaga at skiftast um uppgávurnar, sum eru í Mentanarhúsinum, men til Prixið eru teir báðir til arbeiðis.

– Hetta tiltakið er nakað størri enn tað, sum vanliga



*Kalt blátt ljós skein á Frostbit, sum var ein av bólkunum, ið spældi til Prixið leygarkvøldið*
Mynd: Jens Kr. Vang

# Alt gongur upp á stás

**Samskiparin av Prix Føroyum er væl nøgdur við Prixið higartil. Umførini hava gingið sera væl, tónleikurin hevur verið góður, og aftur hesaferð er áhugin millum fólk fyri kappingini sera stórur**

PRIX
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Prix Føroyar tónleikakappingin hevur aftur einaferð staðfest sína støðu sum eitt spennandi og populert tiltak í føroyskum tónleikalívi.

– Vit eru sera væl nøgd við umførini higartil. Áhugin fyri kappingini hevur verið stórur, og tvey av umførunum hava verið útseld. Bólkarnir hava verið góður, tónleikurin hevur verið áhugarverdur og varieraður, og øll fyrireiking og avvikling hevur gingið sum ætlað, sigur Fróði Vestergaard, samskipari av Prixnum.

Hann er fegin um, at allir tónleikararnir taka kappingina í so stórum álvara.

– Bólkarnir eru væl fyrireikaðir, tónleikararnir halda tíðirnar, teir eru edrúir og disiplineraðir, og tí koyrir alt so væl. Tað er ein fragd at arbeiða vi so professionellum tónleikarum, sigur Fróði Vestergaard.

## Breitt úrval av tónleik

Samskiparin av Prixnum er væl nøgdur við, at variatiónin í tónleikinum er størri hesaferð, enn hon onkuntíð hevur verið.

– Vit hava nógv ymisk sløg av tónleiki. Tann melodiøsi popprockurin er betri umboðaður, enn hann onkuntíð hevur verið, men vit hava eisini nógvar nýskapandi og meira alternativar bólkar. Samanumtikið er støðið sera høgt, og eingin bólkur hevur verið vánaligur.



*– Vit hava nógv ymisk sløg av tónleiki. Tann melodiøsi popprockurin er betri umboðaður, enn hann onkuntíð hevur verið, men vit hava eisini nógvar nýskapandi og meira alternativar bólkar. Samanumtikið er støðið sera høgt, og eingin bólkur hevur verið vánaligur, heldur samskiparin av Prix Føroyum*
Mynd: Jens Kr. Vang

– Tað er gott, at royndir tónleikarar sum Eyðun Nolsøe, Terji Rasmussen, All That Rain og Rok vilja verða við í Prixnum, samstundis sum vit hava spennandi ungar bólkar sum Lawetz, Makrel, Side Effect og aðrar við eisini. Breiddin er sera stór.

Fróði Vestergaard kennir seg sannførdan um, at Prixið fer at kunna bjóða teimum útlendsku gestunum, sum plaga at koma til finaluna, nógvan góðan tónleik.

– Um tað skuldi hent, at teir meira poppkendu bólkarnir komu í finaluna, so hava vit møguleikan at blanda kortini eitt sindur við at bjóða meira alternativum bólkum við eisini. Í øllum førum kunnu vit bjóða nógvan góðan og verieraðan tónleik, sigur Fróði Vestergaard.